***Skálafjalsmálið:***

# Spakførur reiðari

*Føroya Rættur byrjaði í gjár avhoyringina av Jørgen Bech, sum var reiðari á Skálafjalli*



Klokkan var farin eitt sindur av níggju gjáramorgunin, tá Jørgen Bech varð biðin um at seta seg í stólin, sum ákærdir og vitni skulu sita á ein fyri og annar eftir, tá tey verða avhoyrd.

Á hesum stóli sat Jørgen Bech allan rættarfundin í gjár, og tað skal hann eisini gera í allan dag.

Hann situr við dómaranum beint frammanfyri sær, vinstrumegin situr ákærin, og høgrumegin sita hinir ákærdu og verjar teirra.

Aftanfyri standa fleiri røð av stólum til áhoyrar, men higartil er bara onkur stollin inn á gólvið at lurta. Fólk hava kanska ikki so stóran áhuga fyri hesum máinum. Nøkur tíðindafólk sita tó og royna at fylgja við.

### Minnist ikki alt

Avhoyringin í gjár byrjaði við, at Jørgen Bech varð biðin at greiða frá gongdini.

Hann er spakførur maður, og svarar upp á teir spurningar, honum verða settir. Tó er tað nógv, hann ikki minnist.

Jørgen Bech er uppruna-liga elektrikari og arbeiddi fyri /P/F Beta í Fuglafirði, har hann hevði eftirlit við skipinum. Tað fíggjarliga hevði hann einki við at gera.

Í 1971 var hann við til at stovna P/F Vál, sum seinni læt Skálfjall byggja. Tað fyrsta árið var hann bæði nevndarlimur og stjóri, men fór síðan frá sum stjóri, tí aðrir hildu seg duga betur, sum hann segði í rættinum í gjár.

Ætlanin var at byggja nótaskip, men tað tók ov langa tíð, og teir keyptu tí í staðin Leiv Hepna frá landsstýrinum og bygdu um. Skipið fekk navnið Skálafossur.

Tað gekk væl við Skálafossi.

Í 1984 ætlaðu teir at byggja nýtt og størri skip. Ætlanin var at byggja ein skip sum Niels Paula. Keypti Jørgen Bech fleiri partaeigarar út, samstundis sum onnur, t.d. arbeiðsmannafelagið var sinnað at seta meira pening í.

Jørgen Bech varð nú aftur stjóri í felagnum, og teir vóru bara tríggir í nevndini.

### Hugsaðu um onnur fiskasløg

Skipið skuldi vera eitt fyrstiskip, og ætlanin var at leggja seg eftir at fiska onnur fiskasløg sum t.d. kongafisk og blálongu.

Landsstýrið játtaðu stuðul til hetta skipið.

Jørgen Bech dugdi ikki at siga rættiliga, hví tann byggiætlanin varð slept. Men teir komu á fundinum inn á, at í 1985 kom nýtt landsstýrið, sum setti sítt álit á svartkjaftin. Skipapakkin kom, og skip sum tað, Vál ætlaði at byggja, varki í pakkanum.

Tier væntaðu tí størri vælvild frá landsstýrinum, um teir bygdu skip til svartkjaft eisini.

Jørgen Bech hevði í hyggju at byggja skipið á Skála, tí tað kravdi landsstýrið. Men hann ætlaði tó at lata skrokkin gera í Noregi fyri at fáa rentustuðilin, sum fekst í Noregi. Men tað gingu landsstýrið og skipasmiðjan ikki við til.

Á rættarfundinum í gjár varð tosað eitt sindur um hvørjir møguleikar vóru at fáa eginpening. Jørgen Bech segði, at øll vistu, at Tummas Ørv og Mainhard Haldansen settu í skip. Teir settu í at kalla øll skip, sum bygd vórðu.

Sáttmáli um at byggja skipið fyri 86, 5 mió. krónur á Skála varð gjørdur. Í teimum fyrireikingunum og samráðingunum hevði P/F Vál Teknocon og løgfrøðiliga ráðgevan Magnus Petersen at hjálpa sær.

**randi**




*Johanna hevur úr at gera við at avgreiða OLJUPAKKAR til teir mongu føroyingar, sum við stórum áhuga fylgja við, hvat hendir í undirgrundar- og marknamálinum. Mynd kalmar*

*OLJUPAKKIN, sum føroyingum hevur staðið í boði at ogna sær nú í eina tíð, gongur sum heitt breyð. Í byrjaðu seismisku kanningarnar, sum hava samband við komandi oljuleiting við Føroyar. Hjá teimum, sum ikki hava tikið av hesum tilboði er tí rætta høvið júst nú at bíleggja OLJUPAKKAN, soleiðis at tú kanst verða kunnaður um, hvat higartil er hent í hesum spennandi máli, og harvið verða betri brynjaður til at fylgja við í tí, sum nú fer at henda.*

Neyvan taka vit munnin ov fullan, tá vit siga, at einki blað og fyri tað heldur eingin fjølmiðil í Føroyum hevur fylgt so væl við og gjørt so nógv burtur úr spurninginum um eina komandi føroyska oljuvinnu og spentu marknatrætuni við bretar sum Sosialurin.

Tað fer ikki dagur, at ikki onkur skúli, onkur fyritøka ella okkkurt felag vendir seg til blaðið fyri at fáa avrit av greinum um ymisk samfelagsmál. Tá eftirspurningurin eftir greinum um undirgrund, olju og mark yvirhálaði allar aðrar - og tingið eisini fyri fyrstu ferð skuldi til at viðgera hetta stóra mál - tóku vit stig til OLJUPAKKAN. Hetta er ringbind við avritum av øllum greinunum, sum hava staðið í Sosialinum um umrøddu mál hesi seinastu fýra árini, umframt nakað av eldri greinum.

OLJUPAKKIN telir fleiri hundrað síður og gevur hann brúkaranum eitt gott innlit í, hvat er hent á økinum hesi seinastu árini.

Nú seismiskar kanningar eru byrjaðar - og harvið hol sett á eitt heilt nýtt kapittul í føroyskari vinnusøgu - halda vit OLJUPAKKAN verða sera hentan hjá øllum teimum, sum hava áhuga fyri hesum máli.

Ringið til okkara ella sendið inn lepan og tit fáa OLJUPAKKAN sendandi. Hann kostar 500 kr.

**Ja!** Sendið mær OLJUPAKKAN

Evni: ..............................................................

..............................................................

..............................................................

fyri kr. 500,-, sum eg gjaldi

❑ Við kekki, ❑ Postuppkravi ella ❑ Banka/giroflyting

Navn: ..............................................................

Bústaður: ..............................................................

Bygd/býur: ..............................Tlf.: ..................

Sendið lepan til
**Tíðindablaðið SOSIALURIN**
**Box 76 – 110 Tórshavn**